# Botnkort sum ískoyti til greinina »Fyribils frásøgn um botnkanningar á sjóøkinum uttan um Føroyar«

*Eftir Jóannes Rasmussen.**)

Í greinini um botnkanningar á sjóøkinum uttan um Føroyar (Rasmussen 1973) var sagt frá, at eitt endamálið við kanningunum var at fáa til vegar eitt botnkort at nýta sum grundarlag undir framhaldandi jarðfrøðiligum rannsóknararbeiði. Hetta kortið er nú liðugt teknað út til 100 m dýpdarlinjuna, men ætlingin er at halda fram við uppmátingararbeiðinum út til 200 m dýpi. Við tað at kortið, sum er, kanska ikki bara hevur áhuga fyri okkum sjálvar sum grundarlag undir framhaldandi arbeiði, men eisini fyri aðrar, verður tað lagt fram longu nú sum ískoyti til omanfyri nevndu grein.

Skákstrikurnar á 1. mynd eru grønar deccalinjur. Siglt var eftir hesum linjum innan fyri 100 m dýpdarlinjuna (prikkað á 1. mynd) í teirri røð sum tølini á myndini vísa. Ekkoloddið (Simrad EK 12 A) gekk alla tíðina meðan siglt varð; krossstøðirnar millum reyðar og grønar deccalinjur vóru avmerktar á ekkoloddpappírið og klokkutíðirnar uppskrivaðar fyri hvørja krossstøð. Á henda hátt vóru fingnir 90 ekkoloddbotnsskurðir. Norðan fyri Føroyar roynist deccastaðfestingin ikki væl, so her var í flestum førum (skurðirnir 68—90) nýtt radar og ýti av landi.

Aftan á at tilfarið var umfarið á Jarðfrøðisavninum var tað

---

*) Danmarks Geologiske Undersøgelse og Føroya Jarðfrøðissavn.

latið til Søkortarkivet í Keypmannahavn har tað var viðgjørt og útteknað til kort.

Kortið hevur somu stødd sum deccakortið, munurin millum dýpdarlinjurnar er 10 m.

SUMMARY

The enclosed map is an appendix to a preliminary report on studies in bathymetry around the Faroe Isles (Rasmussen 1973). The map (10 m contours) is based on Echo soundings along Deccalines within 100 m depth. The map is only part of a continuing bathymetrical work.

BÓKMENTIR

1. *Rasmussen, Jóannes:* Fyribils frásøgn um botnkanningar á sjóøkinum uttan um Føroyar. Fróðskaparrit 21. bók bls. 86—93. Tórshavn 1973.



*1. mynd.* Skákstrikurnar eru grønar deccalinjur. Tær samsvara við siglingarleiðirnar og ekkoloddbotnsskurðirnar. 100 m dýpdarlinjan er prikkað. *Crossed lines: Green Deccalines and Echo sounding routes. 100 m contour line is dotted.*